







# Íslendsk opera í Norðurlandahúsinum

-Tað var ein góð framførsla hjá íslendska operabólkinum, og fólk vóru glað fyri tað, sigur Niels Halm, stjóri í Norðurlandahúsinum

OPERA

*Hans Kárason Mikkelsen*
*mikkels@fas.harvard.edu*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Ein íslendskur operabólkur framførdi operaina Spellbound í Norðurlandahúsinum um vikuskiftið.

– Fólk vóru glað fyri framførsluna, men tíverri fall operatiltakið saman við konfirmatiónunum sunnudagin, so tað vóru ikki so nógv fólk í Norðurlandahúsinum henda dagin. Eini 30-40 fólk vóru komin at lýða á, sigur Niels Halm.

Eitt franskt sjónvarpslið var við á ferðini hjá íslendingunum, tí leiðarin fyri bólkin er fraklendingur, og dokumentarfilmur skuldi upptakast. Tískil bar ikki til at flyta tiltakið.

Tað var Helga Hjörvar, fyrrverandi stjórin í Norðurlandahúsinum, sum hevði fingið avtaluna í lag við íslendska operafólkið.

## Húsið skal brúkast

Niels Halm varð settur sum stjóri í Norðurlandahúsinum tann 1. februar í ár, tá hann tók við eftir Helgu Hjörvar. Áður hevur Niels Halm verið stjóri á tí donsku altjóða mentanarskrivstovuni og booking- og eventstjóri í ARTE. Tann 52 ára gamli danin stóð eisini fyri mentanarskránni, tá danir sótu við ES-formansskapinum. Tað var eitt samt stýri fyri føroyska Norðurlandahúsið, sum setti Niels Halm í stjórasessin.

Niels Halm sigur, at hann vil satsa so breitt sum gjørligt og upp á góðsku.

-Eg vil fegin arbeiða saman við mentanarumhvørvinum í Føroyum, og eisini saman við fjølmiðlunum og fyritøkum, sigur Niels Halm.

Hann leggur afturat, at tað er sera týdningarmikið, at húsið verður brúkt og sigur í tí sambandi, at hann avgjørt heldur, at húsið skal vera opið í desember mánaði.

**-hkm**